# HEILSANIR



**Góðu elskaðu Ása og Karolina**
Hjartaliga tillukku við 5 og 2 ára degunum. Vit elska tykkum.
**Heilsan mamma og babba**



**Góði fitti Pætur**
Hjartaliga til lukku við 2 ára føðingardegnum, sum var 5. sept. Jesuspápi signi framtíð tína. Vit sakna teg nógv.
**Omma og abbi á Argjum**



**Góða Herta Nikolina**
Hjartaliga tillukku við 9 ára føðingardegnum, ynskja vit øll
**Pápi**



**Góði elskaði Djóni**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum.
**Ynskja Jóhannis, Kristbjørg og Karstin**



**Góði elskaði Djóni**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum í dag.
**Ynskja mamma og babba**



**Góði Ragnar**
Hjartaliga tillukku við 8 ára føðingardegnum. Eisini ein heilsan til Hildigunn, sum fyllir 8 og .... sama dag.
**Heilsan vit Petra og Hans Ps.** Eisini ein heilsan til babba, sum fylti 7.



**Góða fitta Maria**
Omma og abbi ynskja tær hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum. Vit gleða okkum at fáa "hestamuu"-køku frá tær.
**Heilsan omma og abbi á Bumshamri**



**Elskaða Maria**
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum 7. sept., vónandi fært tú ein stuttligan dag. Tú ert fittasta brúðargenta í verðini. Mamma og babba elska teg


Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á middegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskiat í blaðið ávísan dag.

☐ Týsd. ☐ Mikud. ☐ Hósd. ☐ Fríggjad. ☐ Leygard.

Tekstur: ............................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navnið og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ............................................
Bústaður: ............................................
Bygd/býur: .............................. Tlf.: ..............

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<


# TILTØK

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygardagin kl. 20.00 Evangel. møti, Niels E. Olsen talar. Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, Niels E. Olsen talar. Øll eru vælkomin.

**Evangel. fundir í DK – Samkoman Malta**
Leygarkvøldið kl. 19.00 Evangel. fundur í Skolehjemmet, Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Sunnukvøldið kl. 17.00 Evangel. fundur í Staldgårdsgade 4, Vejle. Talarar eru Levi Joensen og aðrir. Eftir fundirnar bjóða vit ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30 Aftaná er kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.hotel-orkin.com

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagin 5. september***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00-11.45 Enskt, talumál 1. Hilda Frýdal. ***(Byrjar 19. sept. tilm. 316491).***
***Matgerð: Anne Grethe Harlou, tilm. 316491***
kl. 14.00-17.00 Kortspæl, telving, bobbspæl, dart og onnur spøl
***Týsdagin 6. september***
kl. 10.00-11.30 Vit syngja, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15.00 Uppskot um hvat vit skulu gera í vetur. Øll eru vælkomin við hugskotum.
***Mikudagin 7. september***
kl. 10.00-12.00 Handarbeiði, Dominobinding, binding á knagum o.a. spennandi. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Hósdagin 8. september***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14.00-17.00 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14.00-16.00 Boccia í kjallaranum. Spælandi venjari Alma Poulsen
***Fríggjadagin 9. september***
kl. 10.00-12.00 Tekning og máling. Øll áhugað eru vælkomin. Havi tilfar við. Vegleiðing er á staðnum.
kl. 12.00-17.00 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn, gongutúrur**
Sunnudagin 11. september verður ein gongutúrur út á Mjóðanes í Eysturoynni. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 9.00. Túrurin er drúgvur gingið verður uml. 6 tímar, minst til at hava góð og heit gonguklæðir og ein matpakka við. Tilmelding neyðug.

**Eysturoyar Gongufelag**
Farið verður til Hetlands 15. september og heimaftur 18. september. Gist verður á oynni Unst 1 nátt og í Lervik 1 nátt. Prísur kr. 2.500 íroknað gisting og ferðing. Tilmelding á Kunningarstovuni í Runavík tlf. 449449 áðrenn týsdagin 13. september kl. 15.00.